# álvari



*- Eg vil ikki siga, at eg ikki tímdi. Men eg kundi verið væl meira seriøsur. Men eg hevði og havi eitt frálíkt lív. Mær dámdi sera væl náttarlívið, og eg iðri meg ikki um nakað ballingarkvøld í dag. Og soleiðis vildi eg hava tað, sigur Alexander Djordjevic*

ættarliðnum, sum seinast í 80-árunum og tíðliga í 90-unum settu Jugoslavia á fótbóltskortið. Í altjóða fótbólti hevur hann fleiri flott úrslit at vísa á sum leikari í FK Partizan.

Er trupulleikin tann sami í føroyskum fótbólti – at evnini eru har, men tú vil ikki stríðast fyri tí?

- Hugburðurin til fótbóltin í Føroyum er nógv øðrvísi. Tað eigur tað eisini, um tú samanber yrkisfótbólt og áhugafótbólt. Tað er himmalvíður munur. Her er tað bara soleiðis, at sleppur tú ikki at spæla, so skiftir tú felag. Sleppur tú heldur ikki upp á lið har, gevst tú við fótbóltinum. Frá ungum árum skal vinnara- og stríðsviljin leggjast í hvønn einasta spælara. Tí evnini eru avgjørt til staðar til 18 ára aldur. Men har steðgar tað.

Hvat er tín loysn?

- Altso, ein og hvør kundi skriva eina bók um, hvat er rætt og skeivt við fótbólti. Men fyri at lyfta títt egna støðið sum føroyingur, noyðist tú avstað. Og ikki bara í seks mánaðir ella eitt ár. Gev tí eini fimm ár, og gloymi Føroyar. Tú skal venja teg við at verða í leikarahópinum á 22 mans og stríðast fyri tínum plássi. Tú verður noyddur at taka handan túrin út á beinkin. Hugsa tær, tá tú hevur fingið viðgongd í útlandinum. Tú verður fantastiska glaður fyri tær upplivingarnar, tú fært. Eg havi spælt fleiri grannauppgerðir við Partizan móti Reyðu Stjørnu, har eini 100.000 áskoðarar hugdu at. Eg gloymi tað ongantíð. Tað eru slíkar upplivingar, tú skalt koma heim til Føroya við einaferð. Teir eru fleiri, sum koma heimaftur. Spyr teir, hvussu teir kenna tað. Eg trúgvi ikki, teir hava givið tí ein møguleika. Um tú vilt, er einki ógjørligt. Tað er ikki bara at royna tað – men at fullføra tað!, sigur serbiski klaksvíkingurin Alexander Djordjevic at enda.

## Heimaarbeiði betrast

Alexander Djordjevic flutti sum 32 ára gamal til Føroya í 2001, har hann saman við venjaranum Tomislav Sivic skuldi royna at lyfta sigursvanda KÍ aftur á ovastu rók.

Kendi tú nakað trýst á tær sum útlendingur í bestu føroysku deildini?

- Nei, ikki beinleiðis nakað trýst. Men eg kendi tað sum mína skyldu at prógva nakað. Klaksvíkin tók ótrúliga væl ímóti mær, og tá fólk stuðlaðu mær so væl, mátti eg løna teimum tað aftur á vøllinum. Tí tað er ikki lætt at flyta til Føroya. Veðrið, vallirnir og øðrvísi umstøðurnar eru torførar at venja seg við í byrjanini. Og sjálvandi, um eg ikki munaði á liðnum, vóru fjepparararnir eftir mær. Men feløgini kundu gjørt heimaarbeiði munandi betri. Tað loysir seg ikki at taka onkran tilvildarliga aðru ella triðjudeildar leikara onkrastaðni frá, og gera avtalu við hann. Tú noyðist at kanna fortíðina hjá einstøku spælarunum, so tú veitst, hvat teir standa fyri, slær Alexander Djordjevic fast.




**Føroyar eru næst vánaligasta landslið í Evropa. Vit hava ikki fingið nakað stig í hvørki EM- ella HM undankapping síðan 2004. Seinastu árini hava vit raplað niður eftir styrkislistanum hjá FIFA. Í løtuni liggja vit nummar 196 – bara 11 lond eru aftan fyri okkum.**

**Sosialurin varpar komandi vikurnar ljós á keðiligu gongdina. Vit leita eftir orsøkunum til, hví tað gongur so illa í hond og spyrja hvat skal til fyri at venda óhepnu gongdini?**

**Lesið fjórða part í røðini um kreppuna í føroyskum fótbólti.**

Serbin stórtrívist í Føroyum í dag. Hann hevur føroyska konu, og staðfestir, at hann ikki ynskir seg í øðrum landi enn teimum 18 brimbradu oyggjunum í norðuratlanshavinum. Ætlanin er at byggja hús í Klaksvík. Sum hann sjálvur sigur tað.

- Eg haldi ikki, at eg nakrantíð havi sovið betri enn eg geri í Føroyum.

*Myndir: Álvur Haraldsen*



**7. partur**

**Í blaðnum hósdagin verður prátað við Jákup Mørk um sama evni**

